# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## Býráðið

**Dagfesting:** 27.04.2023 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir: Kristian Martin Petersen fyri Edvu Jacobsen

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 9/23 | 23/00246-1 | Inkalling av Kristian Martin Petersen til býráðsfund 27. apríl 2023 |
| 10/23 | 20/00608-13 | Ferðavinnupolitikkur 2020/2021 |
| 11/23 | 23/00168-3 | Flogfenahald reglugerð |
| 12/23 | 23/00178-1 | Íbindingargjald vatn og kloakk |
| 13/23 | 22/00351-6 | Uppskot um broyting í upptøkureglunum |
| 14/23 | 23/00241-2 | Góðkenning av ársroknskapi 2022 |
| **Til kunning** | | |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til støðutakan**

## 9/23
## 23/00246-1 Inkalling av Kristian Martin Petersen til býráðsfund 27. apríl 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.04.2023 | 9/23 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Edva Jacobsen, býráðslimur, hevur forfall til býráðsfundin 27. apríl 2023 kl. 19:00. Eftir ynski frá Edvu Jacobsen er Kristian Martin Petersen kallaður inn til býráðsfundin sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Kristian Martin Petersen er fjórðvaldi limurin á lista B við 46 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum 27.apríl gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslíminum Kristian Martin Petersen eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Edva Jacobsen, býráðslimur hevur forfall til býráðsfundin 27. apríl 2023 kl. 19:00. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Kommunustýrislógin, kapittul 3**<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Dávur Juul, borgarstjóri, mælir til, at Kristian Martin Petersen kann taka sætið í Fuglafjarðar býráð í sambandi við býráðsfundin 27. apríl 2023 kl. 19:00. | | |
| Dagf | 25. apríl 2023 | | |

2

**Býráðið 27. april 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við at Kristian Martin Petersen tekur sæti fyri Edvu Jacobsen á býráðsfundinum 27. apríl 2023.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**10/23**
**20/00608-13 Ferðavinnupolitikkur 2020/2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 9/23 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 11.04.2023 | 5/23 |
| 3 Býráðið | 27.04.2023 | 10/23 |

**Tilráðing**

<table>
<tr><td>Til viðgerðar í</td><td colspan="3">Mentamálanevndini</td></tr>
<tr><td>Stutt lýsing av málinum</td><td colspan="3">Hóast arbeiðið við ferðavinnupolitikkinum var lagt fram á kunnandi fundi fyri borgarar í mai 2022, so hevur býráðið, ongantíð endaliga samtykt ferðavinnuætlanina/politikkin. Heldur ikki er endaliga raðfestingin gjørd og vit mangla somuleiðis at prenta faldarin og fáa hendan lagdan út á netið.<br>Tískil verður málið tikið upp aftur, lagt fyri nevnd við eini áheitan um at fáa Sissal Kristiansen at gera seinastu rættingar, áðrenn endaligi faldarin verður lagdur fyri býráðið til viðtøku og síðani alment út á hemasíðuna.<br>Ferðavinnuætlanin verður ein góður viðleikari til miðbýarætlanina og tískil er umráðandi at fáa hesa endaliga viðtikna.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Endalig uppfylging av málinum.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Nei</td><td>Nei</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Nei</td><td>Nei</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Mælt verður til at Sissal Kristiansen, ger tær rættingar, ið skulu gerast, og hevur eina framløgu fyri býráðnum 27. apríl.<br><br>Ískoyti til Býráðsfundin 27. Apríl 2023<br>Mælt verður býráðnum til at góðkenna faldarin, soleiðis at kann leggjast á heimasíðuna hjá kommununi og arbeiðast kann víðari við at fáa hann prentaðan.</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Dagf | 06.03.2023 |
|---|---|

**Mentamálanevndin 08. marts 2023:**

Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum og mælir til at vinnunevndin somuleiðis viðgerð spurningin, áðrenn tað verður lagt fyri fíggjarætlan. Hetta av tí orsøk, at málsøkið er tvíbýtt millum øki 5 og øki 7.

**Vinnu- og havnanevndin 11. apríl 2023:**
Vinnu- og havnanevndin fylgir einmælt tilmælinum frá mentanarnevndini

**Býráðið 27. april 2023:**
Býráðið samtykti einmælt at taka undir við at góðkenna faldaran og at hesin verður prentaður og lagdur út á heimasíðuna. 5

**11/23**
**23/00168-3 Flogfenahald reglugerð**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Orku- og umhvørvisnevndin | 11.04.2023 | 1/23 |
| 2 Býráðið | 27.04.2023 | 11/23 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Nevnd/ir | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Umhvørvisstovan hevur sent skriv út um at mælt verður til at kommunur í Føroyum seta reglur um flogfenaðhald í gildi. Endamálið við reglugerðunum er m.a. at fyribyrgja, at flogfenaður er til ampa fyri fólk í grannalagnum og at fyribyrgja rottu í nærumhvørvinum.<br><br>Reglugerðin ásetur m.a. treytir fyri hús, búr, girðingar og tílíkt. Eisini eru krøv um, hvussu fóður skal goymast og gevast fyri at fyribyrgja, at flogfenaðhald dregur rottu at sær.<br><br>Reglugerðin kann gerast sambært § 23 í kunngerð um umhvørvisreglur, og skal góðkennast av Umhvørvisstovuni. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Umhvørvisstovan hevur sent skriv út um at mælt verður til at kommunur í Føroyum seta reglur um flogfenaðhald í gildi. | | |
| Grundarlag | • § 23 í kunngerð um umhvørvisreglur<br>• Reglugerð - uppskot | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | nei | Nei |
| | Umsitingarligar | nei | nei |
| Tilmæli | Tekniski leiðari mælir orku- og umhvørvisnevndina til at góðkenna reglugerðina um flogfenaðhald í Fuglafjarðar kommunu | | |
| Dagf | 23.03.2023 | | |

**Orku- og umhvørvisnevndin 11. apríl 2023:**
Orku- og umhvørvisnevndin mælir einmælt býráðnum til at fylgja tilmælinum frá tekniska leiðara

**Býráðið 27. april 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við, at seta reglugerðina fyri flogfenað hald í gildi í Fuglafjarðar kommunu.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 12/23
## 23/00178-1 Íbindingargjald vatn og kloakk

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.04.2023 | 19/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 14/23 |
| 3 Býráðið | 27.04.2023 | 12/23 |

### Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráði | | |
| Stutt lýsing av málinum | Alsamt fleiri senda fyrispurning um íbinding í kloakk og vatnleiðingar hjá kommununi, til útstykkingar sum ikki eru kommunalar. Hesar útreiðslur eru ikki íroknaðar í fíggjarætlanini og verða tí ein eyka útreiðsla hjá kommununi. Eisini kann væntast, av somu orsøk, at íbindingin ikki verður framd beinanvegin, tí hon fíggjarliga skal forsvarast.<br>Aðrar kommunur hava íbindingargjøld fyri íbinding í kommunalar leiðingar. Onkrar kommunur hava eitt fast íbindingargjald, aðrar hava eitt gjald fyri íbinding, rokna út frá kvm á grundstykkinum. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Alsamt fleiri senda fyrispurning um íbinding í kloakk og vatnleiðingar hjá kommununi, til útstykkingar sum ikki eru kommunalar. | | |
| Grundarlag | • Fíggjarligi parturin hjá kommununi við at veita vatn og kloakk | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Ja | Nei |
| Tilmæli | Til støðutakan hjá teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráðnum. | | |
| Dagf | 28.03.2023 | | |



**Tekniska nevnd 13. apríl 2023:**
Tekniska nevnd er samd um at áseta eitt íbindargjald á 15.000 kr.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Fíggjarnevndin 24. april 2023:**
Fíggjarnevndin tekur undir við, at kommunan tekur eitt íbindingargjald uppá 15.000 kr.

**Býráðið 27. april 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við at taka eitt íbindingargjald uppá 15.000 kr. fyri íbindingar uttanfyri kommunala útstykking.

9

## 13/23
## 22/00351-6 Uppskot um broyting í upptøkureglunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 17.04.2023 | 4/23 |
| 2 Býráðið | 27.04.2023 | 13/23 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Sosiala nevnd | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | **17.04.2023 Fundur í sosialu nevnd**<br>Máli snýr seg um eina dagføring av uppgøkureglunum fyri dagstovnarnar í Fuglafjarðar kommunu. Upptøkureglarnir blivu seinast dagførdir í 2022.<br><br>**27.04.2023 – Býráðsfundur**<br>Sosiala nevnd samtykti uppskotið um broyting av upptøkureglarnar á fundi 17. Apríl 2023. Máli verður nú lagt fyri býráðið til viðgerðar. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Í upptøkureglunum er pt. Ikki møguligt at taka fyrilit fyri, um barnið sum skal á stovn, hevur systkin sum ganga á einum á stovnunum. Hettar má framganga av upptøkureglunum, tá ið visitera verður til dagstovnapláss. Tí verður uppskot lagt fram um tillaga upptøkureglarnar | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>Uppskot um boyrting í upprøkureglunum | | |
| | Viðgerð | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | **17.04.2023 Fundur í sosialu nevnd**<br>Mælt verður til at Sosiala nevnd samtykkir tillæðingina av upptøkureglunum soleiðis at tað í visitatiónini til dagstovnapláss verður møguligt at taka fyrilit fyri, at barnið hevur systkin á einum av stovnunum<br><br>**27.04.2023 – Býráðsfundur**<br>Á fundi í Sosialu nevnd bleiv uppskot til broyting av upptøkureglunum | | |

| | |
|---|---|
| | fyri dagstovnapláss samtykt. Mælt verður til, at býráðið eisini samtykkir broytingina. |
| Dagf | 14. april 2023 og 26.04.2023 |

**Sosiala nevnd 17. april 2023:**
Sosiala nevnd samtykti uppskot um broyting í upptøkureglunum.

**Býráðið 27. april 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við at taka undir við broytingunum í upptøkureglunum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 14/23
## 23/00241-2 Góðkenning av ársroknskapi 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 16/23 |
| 2 Býráðið | 27.04.2023 | 14/23 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fuglafjarðar kommuna hevur, tann 19.apríl 2023, móttikið uppskot til grannskoðan roknskap fyri 2022 frá Januar- løggilt grannskoðaravirki, unidrskrivaður av Fróða Sivertsen, statsaut. Revisor og grannskoða av Snorra á Bøgarði, skrásettum grannskoðara.<br>Ársroknskapurin hjá Fuglafjarða kommunu fær eina átekning uttan fyrivarni ella ískoytisupplýsingar. Mett verður, at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av kommunnunar ognum og skyldum, fíggjarligu støðu og rakstrarúrsliti.<br>Í grannskoðaraprotokollini verður víst á lutfalsliga stórar meirnýtslur á fleiri økjum. Grannskoðarin heitir á býráð og umsiting at endurskoða mannagongdir við ger og uppfylgjan av fíggjar- og eykafíggjarætlanum, soleiðis at betri samsvar fæst millum fíggjarætlan og staðfest roknskaparskjøl.<br>Í samband við gjøgnumgongd av tryggingum er grannskoðanin komin fram á, at tað eru nakrir tryggingarskaðar sum ikki eru gjørdir upp. Heitt verður á fyrisitingina um at skipa mannagongdirnar soleiðis, at tryggingarskaðar o.a. verður gjørt upp so skjótt sum til ber.<br><br>Høvuðstølini eru samanumtikið hesi:<br>Raksturin uttan íløgur var upp á 73.581 t.kr. í móti eini játtan upp á 71.280 t.kr. svarandi til eina meirnýtslu upp á 2.301 t.kr. §3 og §5 hava samanlagt eina minninýtslu upp á 1.182 t.kr., hini økini hava samanlagt eina meirnýtslu upp á t.kr. 3.489. Av hesum er tað §6 teknisk mál, sum einsamalt hevur gott 50% av meirnýtsluni. |

| Rakstur uttan íløgur | Ætlan 2022 | Rakstur 2022 | Munur |
|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | 12.027.000 | 12.562.723 | 535.723 |
| §2, Almanna & Heilsumál | 26.348.000 | 26.464.598 | 116.598 |
| §3, Børn og Ung | 19.204.000 | 18.401.250 | -802.750 |
| §4, Undirvísing | 4.325.000 | 4.521.647 | 196.647 |
| §5, Mentan og frítíð | 6.678.000 | 6.297.756 | -380.244 |
| §6, Teknisk mál | 6.155.000 | 7.816.154 | 1.661.154 |
| §7. Kommunal virki | -3.457.000 | -2.483.117 | 973.883 |
| | 71.280.000 | 73.581.011 | 2.301.011 |

12

Meirnýtslan á §1 stavar í størsta mun til nýtslu av uttanhýsis ráðgevum, bæði í mun til nýggjar starvsetanir, kanning av málum og menning av organisatiónini.
Fíggjarliga tyngsta rakstrarøkið hjá kommununi er §2 Almanna og Heilsumál. Her er útreiðslan til Samstarvið Nánd á DKK 20.802 t.kr. Afturberingin frá landinum var í 2022 18.421 t.kr.Hetta merkir at kommunan ber meirkostnaðin uppá 2.383 t.kr. av økinum.
Um afturberingin frá landinum verður íroknað uppgerðina av §2, er fíggjarliga tyngsta rakstrarøkið hjá kommununi §3 Børn og Ung, ið kostaði kommununi 18.401 t.kr. Hetta var góðar 800 t.kr. lægri enn ætlað og stavar hetta lutvíst frá hægri brúkaragjøldum og at ættiligt glið ikki kom á ungdómstilboðið í 2022.
§ 6 hevur eina meirnýtslu á 1.661 t.kr. Meirnýtslan er deild á fleiri økir, eitt nú vatnveiting, kloak, kavarudding og gøtuljós.
Á §7 var væntað ein nettoinntøka uppá 3,4 mió. Rakstraríkastið gjørdist ein knøpp mió. lægri. Inntøkan frá Fuglafjarðar havn gjørdist 1,3 mió minni enn ætlað. Hetta kemst serliga av minni bunkrings-virksemi. Eisini var lutfalsliga stór meirnýtsla á moldgoymsluni.

Lønarútreiðslurnar í 2022 vóru uppá 41.051 t.kr. í mun til 41.053 í 2021.
Grannskoðanin ger vart við, at smb. §41 í kommunustýrislógini er ásett, at kommunan er játtanarmyndugleiki og farast kann ikki undir arbeiði uttan at játtan er tøk. Somuleiðis verður gjørt vart við, at talan er um lutfalsliga stórar meirnýtslur á fleiri økjum.

| Rakstur, íløgur | Ætlan 2022 | Rakstur 2022 | Munur |
|---|---|---|---|
| §1, kommunal fyrisiting | -1.930.000 | -1.844.438 | 85.562 |
| §2, Almanna & Heilsumál | 660.000 | 1.023.723 | 363.723 |
| §3, Børn og Ung | 525.000 | 558.395 | 33.395 |
| §4, Undirvísing | 9.220.000 | 7.655.732 | -1.564.268 |
| §5, Mentan og frítíð | 680.000 | 154.083 | -525.917 |
| §6, Teknisk mál | 12.600.000 | 14.920.001 | 2.320.001 |
| §7: Kommunal virki | 2.240.000 | 1.301.721 | -938.279 |
| | 23.995.000 | 23.769.217 | -225.783 |

Íløgurnar í árinum hava verið 23.769 t.kr. ið er 226 t.kr. lægri enn játtað. Á §4 vóru ikki allar íløgur hildnar, meðan §6 hevði stóra meirnýtslu. Tað er serliga væntandi sølan av grundøkjum, sum hevur svikið í 2022.
Inntøkurnar hjá Fuglafjarðar kommunu gjørdist 15,3 mió. kr. hægri enn ætlað, sí niðanfyri

| Skattainntøkur | Ætlan 2022 | Rakstur 2022 | Munur |
|---|---|---|---|
| Húsaleiguskattur | -50.000 | -18.450 | 31.550 |
| Kommunuskattur | -68.849.888 | -74.107.840 | -5.257.952 |
| Partafelagsskattur | -12.000.000 | -21.213.855 | -9.213.855 |
| Skattur av kapitaleftirløn | -14.677.000 | -15.786.380 | -1.109.380 |
| Skattur av DIS & FAS | -2.634.000 | -2.634.444 | -444 |
| Rentur, netto | 2.300.000 | 2.413.017 | 113.017 |
| | -95.910.888 | -111.347.952 | -15.437.064 |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | Rakstur 2022 | Rakstur 2021 | Munur |
|---|---|---|---|
| **Rakstur íalt** | **73.581.011** | **75.098.676** | **1.517.665** |
| §1. Kommunal fyrisiting | 12.562.723 | 12.572.004 | 9.281 |
| §2. Almanna & heilsumál | 26.464.598 | 26.377.143 | -87.455 |
| §3. Børn og ung | 18.401.250 | 17.727.561 | -673.689 |
| §4. Undirvísing | 4.521.647 | 3.661.678 | -859.969 |
| §5. Mentan og frítíð | 6.297.756 | 6.772.800 | 475.043 |
| §6. Teknisk mál | 7.816.154 | 9.503.027 | 1.686.873 |
| §7. Kommunal virki | -2.483.117 | -1.515.536 | 967.582 |
| **Rakstur íalt** | **73.581.011** | **75.098.676** | **1.517.665** |
| **Íløgur íalt** | **23.769.217** | **45.453.571** | **21.684.354** |
| §1. Kommunal fyrisiting | -1.844.438 | 795.262 | 2.639.699 |
| §2. Almanna & heilsumál | 1.023.723 | 7.061.530 | 6.037.807 |
| §3. Børn og ung | 558.395 | 822.743 | 264.348 |
| §4. Undirvísing | 7.655.732 | 16.124.785 | 8.469.053 |
| §5. Mentan og frítíð | 154.083 | 7.341.181 | 7.187.098 |
| §6. Teknisk mál | 14.920.001 | 11.880.067 | -3.039.935 |
| §7. Kommunal virki | 1.301.721 | 1.428.004 | 126.283 |
| **Íløgur íalt** | **23.769.217** | **45.453.571** | **21.684.354** |
| **§ 1. - § 7. íalt** | **97.350.228** | **120.552.247** | **23.202.019** |
| **§ 20. Inntøkur** | **-111.347.952** | **-96.455.142** | **14.892.810** |
| **Gjaldføri frá rakstri** | **-13.997.724** | **24.097.105** | **38.094.829** |

Raksturin í 2022 er lækkaður 1.517 t.kr.samanborið við 2021. Í sama tíðarskeiðið eru íløgurnar lækkaðar við 21.684 t.kr. Inntøkurnar eru samstundis øktar við 14.892 t.kr. Sostatt gjørdist gjaldførisúrslitið fyri raksturin (RLÚ) 13.998 t.kr. í mun til eitt hall uppá 24.097 t.kr. í 2021.Tó skulu avdráttir í 2022 á 6,8 mió kr. dragast frá, og gjørdist ársúrslitið tískil positivt við 7,1 mió kr. Við árslok 2022 er nettolániskuldin fallin frá 1,2 við ársbyrjan niður á 0,95.

Undir eventualskyldir vísir grannskoðarin á, at kommunan er saksøkt eftir endurgjaldið á 1,7 mió kr. Málið er kært og er ikki liðugt enn.

*Grannskoðanarprotokollin verður latin býráðslimum í stórsta trúnaði saman við málinum.*

| | |
|---|---|
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Viðgerð av grannskoðanarprotokol ísv. Roknskapin 2022 |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>• Kommunustýrislóg §38 stk.3 4)Fíggjarnevnd hevur ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap, saman við grannskoðanarfrágreiðing fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar<br>• Kommunustýrisskipan §17 4) Fíggjarnevndin hevur ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap fyri býráðið til góðkenningar og |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | undirskrivingar og 5) at leggja grannskoðanarfrágreiðing fyri býráðið til viðgerðar,<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>• Grannskoðanarprotokol frá grannskoðanarvirkinum Januar<br>• Ársfrásøgn 2022 frá grannskoðanarvirkinum Januar | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Mælt verður til at fíggjarnevndin viðgerð roknskapin fyri 2022 saman við grannskoðanarprotokollini | | |
| Dagf | 21/4 2023 | | |

**Fíggjarnevndin 24. april 2023:**
Fíggjarnevndin hevur viðgjørt roknskap og grannskoðaraprotokol fyri 2022 og mælir býráðnum til at góðkenna roknskapin fyri 2022. 15

**Býráðið 27. april 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við at góðkenna roknskapin fyri 2022.

Fundurin lokin kl. 20.30

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen

Kristian Martin Petersen

16